## Fleiri lið steðga

Altjóða fíggjarkreppan hevur av álvara sett síni fingramerki á Formel 1, sum telist millum dýrastu kappingarítróttirnar í heiminum. Honda hevur longu boðað frá, at teir hava skorið Formel 1 av virksemi sínum, og fyrrverandi kappkoyrarin, Gerhard Berger, ivast ikki í, at fleiri onnur fara sama veg. – Spurningurin er bara, hvat næsta liðið verður, sigur hann. Fleiri lið hava eisini boða frá skerjingum. Eitt nú McLaren, sum hevur minkað sína fíggjarætlan úr 2,4 niður í 1,5 milliardir krónur.



## Henriette fer heim

Danska kvinnulandsliðið í hondbólti má klára seg uttan Henriette Mikkelsen tað, sum eftir er av EM-kappingini í hondbólti. Henrietta eigur eina átta mánaða gamla dóttir, og hon verður altso tikin framum landsliðshondbóltin, eftir at mamman annars hevur verið til EM í eina viku. Ístaðin hevur venjarin, Jan Pytlick, tikið Mie Augustesen við í hópin.

# Danmark orkaði ikki í 2. hálvleiki

**Donsku kvinnurnar spældu ein góðan fyrra hálvleik, men í øðrum hálvleiki orkaðu tær rumensku betur. Danmark fær bara eitt stig við í høvuðsumfarið**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*




*Carmen Andreea brýtur seg ímillum Lene Lund Nielsen og Rikke Skov í dystinum millum Danmark og Rumenia. Danmark var á odda í steðginum, men Rumenia vann kortini dystin*
*Mynd: Polfoto/AP*

Donsku kvinnurnar taptu 25-27 móti Rumenia. Tað merkir, at Danmark fær bara eitt stig við sær til høvuðsumfarið, har tær skulu spæla ímóti Noregi týskvøldið. Og er eyðsæð, at tað verður tungt hjá donsku kvinnunum. Stigið Danmark fær við sær bleiv bjargað ímóti Ungarn í evstu løtu. Ungarn tekur eisini eitt stig við sær til høvuðsumfarið, meðan Rumenia byrjar høvuðsumfarið við 4 stigum.

### Førdu í hálvleikinum

Danmark hevði leiðsluna í hálvleikinum. 13-10 varð hálvleiksstøðan, og varð hendan leiðslan bygd á eitt sera sterkt verjuspæl. Karin Mortensen stóð eisini væl í málinum, og hevði hon eina rúgvu av bjargingum í 1. Hálvleiki. Tað eydnaðist eisini donsku verjuni at halda rumenska stórskjúttanum, Christinu Neagu, sum vísti stórspæl í teimum báðu fyrstu dystunum. Slagelse-spælarin, Carmen Amareii gjørdi tó sítt til at halda Rumenia inni í dystinum. Álopið hjá dønum koyrdi eisini væl, og vísti Katrine Fruelund aftur gamlar taktir. Trine Troelsen fekk eisini nógv burturúr, og Lærke Møller varð sjálvur tryggleikin tá brotskøst skuldu skjótast.

### Rumenia kemur aftur

Í byrjanini av 2. Hálvleiki varð einki, sum talaði fyri, at Rumenia skuldi koma aftur. Tær donsku stríddu seg uppá eina 17-13 leiðslu, men tá byrjaði so smátt at ganga galið. Meðan tær donsku kvinnurnar møddust, so sóu tær rumensku møguleikan at taka leiðsluna aftur. Tingini vóru nú vend, og Rumenia vann sær eina 21-19 leiðslu. Spenningurin helt sær tó um úrslitið til endan, og Rikke Skov syrgdi fyri nøkrum málum fyri, at Danmark hekk í. Men tá alt varð liðugt, hevði Rumenia vunnið 27-25. Danmark spælir ímóti Noreg týskvøldið, Spania mikukvøldið og Ukraina hóskvøldið. Venjarin hjá Danmark, Jan Pytlick metir, at Danmark skal vinna allar tríggjar dystirnar í høvuðsumfarinum, um tað skal eydnast at koma í hálvfinaluna.

# Hildur og Helena í NM-kapping

**Um vikuskiftið tóku tvær føroyskar svimjigentur lut í norðurlendsku meistarakappingini fyri ung**

SVIMJING
*tíðindaskriv*

Leygardagin og sunnudagin var NJM í Södertälje i Svøríki. Svimisambandið sendið hesuferð 2 svimjarar, Hildur á Fløttu úr Fuglafjarðar Svimjifelag og Helena Strøm Sævarsdóttir úr Suðuroyar Svimjifelag. Landsliðsvenjari var Petur Heðin á Fløtti, og leiðari Maud Poulsen úr Svimjisambandinum.

Í stuttari viðmerking sigur Petur Heðin á Fløtti at NJM sum altíð er ein stór avbjóðing fyri okkara svimjarar, serstakliga tí at kappingarstøðið er so høgt. Tær báðar Helena og Hildur hava nú roynt seg í altjóða kapping, og hetta fær eina góða ávirkan. Nakrar persónligar tíðir vórðu betrað, men føroysku svimjararnar vóru ikki á sigurspallinum

Svimjisambandið fer í januar 2009 at leggja kravtíðir til NJM í 2009 og 2010, og í hesum sambandi fer at verða úttikið eitt NJM-bruttolið av fyrsta- og annað-ársjuniorum.

# Avloysarin skal finnast

**Eftir at hava biðið Jógvan Martini Olsen farvæl, eigur Fótbóltssambandið nú at seta orð á tær dygdir, sum avloysarin skal hava**



ÍTRÓTTARKLUMMAN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fríggjadagin kundi nú fyrrverandi landsliðsvenjari okkara, Jógvan Martin Olsen, biðja almenninginum farvæl, tá móttøka varð hildin í FSF-húsinum við Tórsvøll.

Tað mesta, sum er at siga, er longu sagt og skrivað um tíðina hjá Jógvan Martini sum landsliðsvenjara. Kanska hava orðini ikki altíð verið eins positiv, men eftir stendur framvegis, at hann átók sær eina serstakliga trupla uppgávu í eini tíð, har tað stóð greitt, at stórar skiftingar máttu fremjast, og at úrslitini tí neyvan fóru at verða eftir vild allatíðina.

Og hóast hann helst visti, at kredittурin ikki varð tann stóri, tá talan var um hjálparvenjaran gjøgnum átta ár, so átók treiski toftamaðurin sær uppgávuna. Og sjálvt fremstu kritikkarar hansara mugu ásanna, at ein komandi landsliðsvenjari fær munandi betri fortreytir at arbeiða við, enn Jógvan Martin sjálvur hevði.

Eftir er so hjá FSF at finna fram til, hvør avloysarin skal verða. Í september varð sagt, at góð tíð var at finna hendan, men september eru altso tríggir mánaðir síðani, og tí ræður nú um at skunda sær.

Fyrireikingarnar eru týdningarmiklar, og her má og skal FSF gera sær greitt, hvat vit vilja við einum komandi landsliðsvenjara, og á tann hátt tekna eina vangamynd av tí, sum farast skal eftir.

Sjálvandi má ansast eftir, at FSF ikki ovtekur seg fíggjarliga, men fyri føroyskan fótbólt er at vóna, at talan so ella so verður um ein kapasitet, sum eisini megnar at røkka út til feløgini kring landið. Tað er fyrst og fremst her, at lunnar verða lagdir undir eina góða føroyska landsliðsframtíð, og tað gerst best við at hugsa longur enn bara til dagin í morgin. Nakað sum føroyskur fótbóltur ikki hevur dugað nóg væl í skjótt fleiri ár.